# SAMSKIFTI, SAMSKIPAN & RÁÐGEVING

Vit sóknast eftir einum samskiftisleiðara, ið hevur hugflog og skapandi evnir, hevur áhuga í orku og umhvørvi, og sum ynskir at kunna um og bera fram okkara virksemi, visjónir og mál.

Ráðgeving og samskipan eru lyklauppgávur. Samskiftisleiðarin skal standa fyri samskiftinum innan- og uttanhýsis í tøttum samstarvi við allar deildir hjá SEV. Hetta inniber millum annað at hava ábyrgdina av heimasíðum okkara.

Branding av SEV, eins og menningin av starvsfólkum okkara innan samskifti, eru partar av uppgávunum hjá samskiftisleiðaranum. Vit ynskja at tú hevur ein "lættan penn", er uppsøkjandi og dugir at bera ein boðskap fram.

Samskiftisleiðarin hevur tilvísing til stjóran, og starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarðandi yrkisfelag.

Hevur tú hug at taka av hesi avbjóðing, er tú vælkomin at senda umsókn við prógvum og øðrum til SEV. Freistin at søkja er mánadagin 28. apríl 2008.

Hevur tú spurningar, er tú vælkomin at ringja til Hákun Djurhuus á telefon 346800.

SEV




Elfelagið SEV - Landavegur 92 - Postsmoga 319 - 110 Tórshavn - www.sev.fo





Roknskapartænastur kring Føroyar




...altíð dagførdir!

Roknskaparstovan, bkv.fo
Telefon 310090
Email: bkv@bkv.fo
J. Dahlsgøta 2 · FO-100 Tórshavn




## KJ NORÐ TRUKK SØKIR VERKFØRARA

Verkførarin hevur ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum hjá KJ Norð Trukk. Verkførarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Verkførarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, viðvirka til at styrkja verandi virksemi og somuleiðis vera við til at finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi.

**Høvuðsuppgáva:**
- At vera driftsleiðari og samskipa ymisku uppgávurnar á verkstaðnum.
- At vera tengilið millum virki, viðskiftafólk og myndugleikar.
- At vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum.
- At vera við til at mynda leiðsluna á virkinum, bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- At vera søluliði og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum.

**Førleikar:**
Roknað verður við at verkførarin:
- Hevur prógv sum maskinsmiður/bilsmiður ella líknandi.
- Hevur ávísan telduførleika, helst eisini í forritinum Navision
- Hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- Hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og er førur fyri at taka avgerðir.
- Dugur at málbera seg á føroyskum, skandinaviskum og helst eisini í enskum máli, bæði skrivliga og munnliga.

Setanin verður framd skjótast gjørligt. Løn og treytir verða ásettar eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Rógva Rasmussen, tel. 588848, teldupostur: rogvi@nordtrukk.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2008.

KJ Norð Trukk fæst í høvuðsheitinum við sølu, útleigan og umvælan av trukkum og aðrari lyftiútgerð

KJ NORÐ TRUKK
TRUKKAR & LYFTIÚTGERÐ

Mykinesgøta 3 · postboks 1315 · Tel 31 51 36 · Faks 310 931 · info@nordtrukk.fo · www.nordtrukk.fo

KREA

## Leiðari til deildina hjá Smyril Blue Water í Tórshavn



- Ert tú ein liðspælari?
- Dugir tú at skapa framburð og góð úrslit?
- Dugir tú at skapa íblástur og trivna hjá tínum starvsfólki?

Um hetta passar til tín persón, so kunnu vit bjóða tær eitt avbjóðandi starv við einum dynamiskum gerandisdegi í okkara spennandi spedition – og shippingfyritøku.

Smyril Blue Water setur trivnaðin hjá starvsfólkunum høgt og samstarv er grundarlagið í okkara gerandisdegi. Tú verður leiðari hjá 16 dugnaligum starvsfólkum.

Vit ynskja, at tú hevur leiðsluroyndir, at tú dugir at brúka tínar persónligu eginleikar og royndir til at seta ting í verk, og at fylgja upp uppá tey.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- Framhaldandi menning av farmaleiðini ímillum Føroyar og Europa
- At Smyril Blue Water gerst eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss
- At hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum á skrivstovuni
- At luttaka í sølufremjandi messum og tiltøkum
- At umsita rakstrarætlan og enda rokniskap

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv
- Luttøku í leiðslubólkinum, har víst verður til stjóran í fyritøkuni
- Fakligar og persónligar avbjóðingar
- Góðar starvstreytir og aðrar ágóðar
- Fríðan bil

Starvið verður at seta skjótast tilber.
Umsøknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21.04.2008.

Umsøknin skal sendast til:

Smyril Line pf.
J. Bronckgøta 37
FO-110 Tórshavn

Att: Andras Róin

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bent Rasmussen, stjóra, á +45 40702156 ella teldupostadressu: bra@sbwcargo.dk.

*Smyril Blue Water bleiv í 2005 stovnað sum eitt joint venture ímillum Smyril Line og Blue Water; felagið hevur høvuðssætið í Tórshavn. Umframt skrivstovuna í Tórshavn, hevur felagið skrivstovu í Hanstholm og á Seyðisfirði í Íslandi.*

SMYRIL BLUE WATER

Smyril Blue Water I www.smyrilbluewater.fo I tlf. 309 600

Lesið Sosialin -so eru tit við!